


# Trolfólk

Søkt verður eftir royndum trolfólki til støðugt arbeiði á trolvirkinum í Vestmanna.

Vinarliga ring á telefon 470 320.

P/f Føroya Trol
Faroe Trawl Ltd.



## SOSIALRÁÐGEVAR/ SOSIALMÁLSVIÐGERAR TIL ALMANNASTOVUNA

Umsóknarfreist er mánadagin 23. juni 2008 kl. 12. Vinarliga merkið brævbjálvan: " Sosialráðgevar til Økisdeild í Havn og ella í Klaksvík".

Almannastovan søkir eftir sosialráðgevum/sosialmálsviðgerum til Økisdeildina í Havn og í Klaksvík.

FØRLEIKAKRØV
Ert tú sosialráðgevi, ella hevur aðra hóskandi sosiala ella samfelagsliga útbúgving, og hevur tú hug til sosialt arbeiði og vilt verða við til at gera ein mun, so er tað tær vit vilja hava fatur á. Royndir í líknandi kunnu vera ein fyrimunur.

STARVIÐ
Sum starvsfólk á Almannastovuni hevur tú ein týðandi leiklut yvirfyri borgarum, tá tað snýr seg um at skapa fíggjarliga og sosiala trygd, at fyribyrgja sosialum trupulleikum og at hjálpa, tá ið trupulleikar koma í.

TILBOÐIÐ
Vit kunnu bjóða eitt starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum, har møguleiki er fyri persónligari og fakligari menning.

LØNAR- OG SETANARVIÐURSKIFTI
Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarbólki 6, ella avvarðandi yrkisfelag, um tað fevnir um sáttmálaøkið hjá Almannastovuni.

NÆRRI UPPLÝSINGAR
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Hildur Eyðunsdóttir, starvsfólkaleiðara ella Jóan Hendrik S. Samuelsen, deildarleiðara í Klaksvík, á tel. 35 35 10.

Umsókn við avriti av prógvum, CV, v.m. skulu sendast til:
Almannastovuna Smyrilsveg 20,
Postboks 3096, 110 Tórshavn.
Ella við telduposti til
almannastovan@almannastovan.fo

almannastovan

almannastovan@almannastovan.fo . www.almannastovan.fo

KREA



## Maskinførari og førari til dumpara

Hevur tú hug at arbeiða í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi við avbjóðingum hvønn dag, so er tað tær vit leita eftir.

Vit leita eftir royndum maskinførara til gummihjulslessara og einum førara til dumpara til eitt av okkara arbeiðsplássum í Havn. Roknast má tó við nakað av arbeiði úti um landi.

Vit roknað við at tú er røsk/raskur, røkin og álítandi og áhuga/ur at arbeiða í toymi.

Vit bjóða góð og skipaði arbeiðsviðurskiftir við nýggjari og góðari útgerð.

Løn eftir avtalu millum partanar.

Størvini verða at seta skjótast gjørligt.

Um hetta hevur tín áhuga og tú vil hoyra nærri um starvi, er tú vælkomin at seta teg í samband við Jón Danielsen á telefon 210683.

ARTICON
á Hjalla · Postboks 3109 · 110 Tórshavn
tel. 350700 · fax 350705

STARVSLÝSING

## SKRIVSTOVUFÓLK

Søkt verður eftir skrivstovufólki til avgreiðsluskrivstovuna hjá Vága Floghavn at byrja 1. juli 2008 ella skjótast tilber.

STARVSØKI TÍTT VERÐUR:
- Lønaravrokning
- Fyrireiking av data og innheinting av floghavnargjøldum
- Hagtalsgreining
- Skjalaskipan
- Dagføring av handbókum
- Dagføring av sjúkulistum og feriulistum
- Postur, móttøka, skráseting og innanhýsis skifti íroknað
- Fyrifallandi arbeiði, so sum ljóstøka, telefonansing, skrivaraarbeiði og annað

VIT VÆNTA, AT TÚ:
- Hevur grundleggjandi førleika í sambandi við skrivstovuarbeiði
- Hevur góðan kunnleika til teld
- Hevur sjálvstøðugan, skilvísan hugburð til at loysa umsitingarlig verkevni og evni at greiða fleiri mál um somu tíð
- Dugir væl at orðbera teg í talu og í skrift
- Arbeiðir samvitskufult og miðvíst og hevur vilja og evni at samstarva á ymiskum stigum
- Vilt taka lut í verkætlanum í sambandi við raksturin av floghavnini
- Sýnir framfýsni, samstarv og nærlagni í arbeiðinum og hevur hug til at veita góða tænastu.

VIT BJÓÐA:
- Eitt starv í skapandi og spennandi arbeiðsumhvørvi.
- Fjølbroyttar og avbjóðandi arbeiðssetningar, ið venda sær úteftir.
- Løn sambært lønarflokki 3 í sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið

FLEIRI UPPLÝSINGAR:
Tørvar tær fleiri upplýsingar, ber til at venda sær til Jákup Persson, Vága Floghavn á telefon 354400

Skrivlig umsókn skal sendast til Vága Floghavn, FO-380 Sørvágur og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 8. juni 2008

Upplýsingar um floghavnina annars finnast á heimasíðu okkara: www.floghavn.fo

VÁGA FLOGHAVN

FO-380 Sørvágur • Telefon 35 44 00 • Faks 35 44 01 • Avgr. tíð 09.00-16.00 • www.floghavn.fo • floghavn@floghavn.fo

SENDISTOVAN